# Hvør verður Ársins Virki og hvør verður Ársins Átak?



Óluva á Lofti

**Starv:**
**Stjóri í Sirri føroyar**

**Heiti:**
**Krambakvinna og Blómubindari**

**Hvør heldur tú skal vinna heitið Ársins Virki 2009?**
Eg haldi at vinnarin av ársins virkið 2009 skal verða Mica.

**Grundgeving**
Hevur funni eina super góða fyritøku ið gevur fleiri fólkið ágóða. Hevur fingið eitt stað at verða super hugnaligt ið ikki áður varð tað og tað skapar hugna til miðbýin.

**Hvør heldur tú skal vinna heitið Ársins Átak 2009?**
Tórshavnar býráð skal vinna ársins heitið fyri at have teirra 100 ára hald so fjørbroytt og gott.

**Grundgeving**
Tað hevur skapað hugna og fingið fleiri fólk at koma oman í miðbýin.



Allan Dalsgarð

**Starv:**
**Sendistovan**

**Heiti:**
**Stjóri**

**Hvør heldur tú skal verða Ársins Átak?**
ETIKA

**Grundgeving:**
Hevði tú gjørt eina marknaðarkanning fyri tveimum árum síðani og spurt, um Tórsbreyt fór at fáa fólk at renna ella um Etika fór at fáa fólk at eta ráan fisk, hevði niðurstøðan helst verið eitt rungandi "nei".
Og høvdu Heðin mortensen og Johannes Jensen bygt teirra avgerðir á hesa niðurstøðu høvdu vit hvørki havt Tórsbreyt ella Etika í dag - og so hevði føroyska samfelagið og fólkaheilsan havt tað verri enn í dag. Hesir báðir lurtaðu eftir hjartanum heldur enn høvdinum. Og tað skal til viðhvørt.
Eftirspurningur og tørvur eru ikki altíð besta grundarlagið at taka avgerðir út frá. Onkuntíð skal dirvi og árræði til at skapa tilboð, sum fólk ikki vistu seg hava tørv á. Í dag er Tórsbreyt fullsett við rennandi føroyingum og føroyingar eru farnir at eta Sushi. Etika er nýhugsan, kompomisleyst fokus á góðsku og enn eitt gott argument fyri at tað er gott at búgva í Føroyum.



Heðin D. Poulsen

**Starv:**
**Tryggingarfelagið Føroyar**

**Heiti:**
**Dagligur leiðari**

**Hvør heldur tú skal vinna heitið Ársins Virki 2009?**
Føroya Banki

**Grundgeving**
Í truplum tíðum, fyri serliga bankar, hevur Føroya Banki, skýrdur av mongum at vera best rikni banki í Danska Kongaríkinum, megnað at koma við einum framúr góðum úrsliti, havt met stóran vøkstur og er komin við fleiri nýggjum tilboðum til viðskiftafólkini.

**Hvør heldur tú skal vinna heitið Ársins Átak 2009?**
Dism fyri teirra fyrsta floks føroyska vodka og akvavit

**Grundgeving**
Føroyska fyritøkan Dism hevur torað at broti upp úr nýggjum og hevur framleitt tvær góðsku vørur, sum kunnu koma at geva eyka inntøkur til føroyska samfelagið. Einasta forðingin fyri framburi er tilafturskomni hugsanarhátturin hjá konservativum føroyskum politikarum.



Sofus Clementsen

**Starv:**
**Posta**

**Heiti:**
**Stjóri**

**Hvør heldur tú skal vinna heitið Ársins Virki 2009?**
P/F Hotel Føroyar

**Grundgeving**
Tí Johannes Jensen við Hvonn og Café Vágsbotn hevur skapað virksemi og lív í Vágsbotni, sum eingin áður hevur megnað tað. Harafturat eru Hotellini Føroyar og Tórshavn nú á einum støði, sum vit kunnu bjóða sjálvt krevjandi gestum.

**Hvør heldur tú skal vinna heitið Ársins Átak 2009?**
Sushi barrin Etika á Áarvegnum í Havn.

**Grundgeving**
Typiskt Johannes Jensen: Fokuserað, einfalt, gjøgnumhugsað og gjøgnumført. Tað virkar bara!



Óli á Deild Olsen

**Starv:**
**FT Online**

**Heiti:**
**Stjóri**

**Hvør heldur tú skal vinna heitið Ársins Virki 2009?**
Bakkafrost

**Grundgeving**
Við nýhugsan og góðum handilsskapi hevur felagið duga at siglt millum skerini í alinvinnuni og eru nú ein av føroysku alirisunum.

**Hvør heldur tú skal vinna heitið Ársins Átak 2009 ?**
Tórshavnar Matfestivalur

**Grundgeving**
Hevur brotið upp úr nýggjum og kasta ljós á føroyska matmentan og teir møguleikar sum liggja í tí føroyska køkinum.



Jóhanna á Bergi

**Starv:**
**Faroe Ship**

**Heiti:**
**Stjóri**

**Hvør heldur tú skal vinna heitið Ársins Virki 2009?**
P/F Hvalnes (Norðborg)

**Grundgeving**
Góð úrslit, áhaldandi, støðufastir og hava duga at laga seg innan sítt øki

**Hvør heldur tú skal vinna heitið Ársins Átak 2009?**
Norðborg

**Grundgeving**
Hava víst dirvi og nýhugsan inn sítt øki í føroyskum høpi.